# Gerðabók í sambandi við býráðsfund nr. 9/2021

**Dagfesting:** 30.09.2021 kl. 19:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Ólavur Larsen og Gudny Vang

Tiltakslimur: Kristian Martin Petersen, ið var tiltakslimur fyri Magna Jøkladal, býráðslim, ið hevði forfall til fundin.

Ikki møtt: Magni Jøkladal, býráðslimur, ið hevði forfall til fundin.

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 38/21 | 21/00343-3 | Havsbrún - Umsókn um øki til nýggjar tangar |
| 39/21 | 21/00355-4 | Fíggjarætlan 2022 - Fuglafjarðar kommuna - karmar til kunning og umrøðu á fíggjar- og býráðsfundi í juni 2021 |
| 40/21 | 21/00524-2 | Broyting av byggisamtyktini fyri útstykkingina á Bøvegi |
| 41/21 | 21/00536-4 | Kristian Martin Petersen innkallaður sum tiltakslimir í sambandi við býráðsfund tann 30. september 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |
| 42/21 | 21/00549-2 | Privatlívspolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu - dátuverndarkunning |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Stoð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**38/21**

## 21/00343-3 Havsbrún - Umsókn um øki til nýggjar tangar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 18.06.2021 | 24/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 20.08.2021 | 28/21 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 17.09.2021 | 40/21 |
| 4 Býráðið | 30.09.2021 | 38/21 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur móttikið umsókn frá Havsbrún um at fáa loyvi til at staðseta tvær nýggjar lýsisiloir á kaiøkið norðuri á Enninum, á leið har sum verandi lýsisiloir standa í dag.<br>Víst verður í umsóknini til avtalu millum Fuglafjarðar kommunu og Havsbrún, dagfest 3. oktober 2019, har tað í §1 stk. 9 og § 8, Øki, sum kommunan skal byggja út, Øki, sum kommunan skal byggja út, stk. 4, Fuglafjarðar kommuna vil virka fyri at ávísa hóskandi øki til nýggjan lýsitanga.<br>Fleiri fiskasløg hava mist MSC og Marine Trust góðkenningina, og tað viðførir, at tørvurin á fleiri lýsitangum er blivin uppaftur meira neyðugur.<br>Av hesi orsøk heitir Havsbrún á Fuglafjarðar kommunu um at vísa á øki, har sum lýsitangar kunnu byggjast.<br>Verandi lýsiøki á Enninum lýkur allar treytirnar, sum verða settar til slík lýsitangaøkir við atliti til trygd, eftirlit og tilbúgvingarætlan.<br>At enda ynskir Havsbrún at innlima nýggjar lýsitangar á økið sunnanvert verandi tangaøki hjá Havsbrún og ynskja góða og skjóta viðgerð.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 20. august 2021**<br>Havnastjórin saman við tekniska leiðaranum hava gjørt eitt uppskot til staðseting av tveimum lýsitangum til Havsbrún.<br>Uppskotið tekur støði í at minka um skrelluøkið, og at taka eitt horn av tangagarðinum hjá Effo Bunkers, soleiðis at pláss er fyri einum lýsitanga á økinum, og at staðseta ein annan lýsitanga norðanfyri verandi lýsitangagarð niðan ímóti verandi p-øki, og planera eitt eitt lítið økið niðan ímóti beninum, soleiðis at tangin ikki kemur at órógva tungu ferðsluna í økinum.<br>Atlit eru tikin fyri ferðslutrygdarætlanini, soleiðis at til ber at flyta bingjur við topplyftara, uttan at fara inn yvir yvirtraksøkið, sum longu nú er uppmerkt. |

2

| | |
|---|---|
| | **Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 17. September 2021**<br>Umsitingin hevur saman við Fuglafjarðar havn arbeitt víðari við málinum um øki til nýggjar lýsitangar.<br>Í sambandi við framtíðarútbyggingar og nýggj altjóða krøv, hevur Havsbrún brúk fyri at gera ein 7.000 tons lýsitanga og ein minni lýsitanga sunnanvert verandi lýsitangaøki, soleiðis at øll lýsitangaskipanin verður stýrd av sama tøknihúsi, sum Havnsbrún fyri stuttum hevur fingið byggiloyvi til.<br>Økið norðanfyri verandi lýsitangaøki, kann ikki nýtast til endamálið, tí her er ætlanir um at spreingja inn í fjallið fyri at fáa til vega grót til eina komandi havnaútbygging.<br>Umsitingin hevur saman við Fuglafjarðar havn kanna møguleika fyri at seta ein 7.000 tons lýsitanga, har sum verandi skrellipláss er staðsett, oeg ein minni tanga á leið somu stødd, sum verandi lýsitangar, á økinum millum 7.000 tons lýsitangan og verandi lýsitangar.<br><br>**Ískoyti til fundin í býráðnum 30. september 2021**<br>Tekniska deild hevur saman við havnastjóranum gjørt eina nýggja staðseting saman í samráð við Havsbrún. Víst verður til plantekning nr. 02, sí FK j. nr. 21/00343-8. Samtyktin í vinnu- og havnanevdini 17. September byggir á hesa staðseting.<br>Norðanfyri verandi lýsitangaøkið ber ikki til at seta tann minna tangan, tí kommunan vil hava økið frítt inn í bergið til aðrar framtíðarætlanir.<br>Talan er um ein 7.000 tons stóran lýsitanga og ein minni, sum er líka stórur sum tann, ið stendur inni í tangagarðinum sum nú er.<br><br>Verandi móttøkupláss hjá Fuglafjarðar havn til olju og rusk eigur ikki at vera staðsett nærhendis oljutangagoymslunum hjá EFFO Bunkers. Undir øllum umstøðum má móttøkuplássi flytast til annað tryggari stað, møguliga við síðuna av havnaskrivstovuni. |
| Bakgrund | Ynski er um at fáa nýtt økið til lýsitangar við atliti til nýggj altjóða krøv, og komandi útbyggingar hjá Havnsbrún. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00343-1 Umsókn frá Havsbrún um øki til lýsitangar<br>FK j. nr. 21/00343-5 Plantekning_Arealdisponering til lýsitangar<br>FK j. nr. 21/00343-8 Plantekning nr. 02_Dagførd staðseting til lýsitangar |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Nevndin mælir til, at umsitingin ger eitt uppskot til tøkt øki til Havsbrún, soleiðis at virksemi hjá Fuglafjarðar havn kann halda fram, bæði tá talan er um ruskøki og eina ferðslutrygdarætlan fyri økið.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin 20. august 2021**<br>Nevndin mælir til at arbeiða víðari við málinum.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 30. september 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við tilmælinu hjá vinnu- og havnanevndini 17. September, og loyva Havsbrún at byggja tveir lýsitangar á økinum sambært tekning, FK j. nr. 21/00343-8. | | |
| Dagf | 7. juni 2021.<br>18. juni 2021.<br>15. juni 2021.<br>13. september 2021. | | |



**Vinnu- og havnanevndin 18. juni 2021:**
Nevndin mælir umsitingini til at eina økisætlan, soleiðis at Havsbrún fær ávíst eitt tøkt øki til teirra lýsitangavirksemi, og at Fuglafjarðar havn kann halda fram við sínum virksemi, bæði tá talan er um ruskøki og eina ferðslutrygdarætlan fyri økið.

**Vinnu- og havnanevndin 20. august 2021:**
Nevndin samtykti, at tekniska deild saman við Fuglafjarðar havn arbeiðir víðari við málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 17. september 2021:**
Nevndin samtykti at geva loyvi til staðseting av tveimum lýsitangum sæmbært umsókn frá Havsbrún, og yvirlitstekning, sum Havsbrún saman við umsitingini hevur gjørt.

**Býráðið 30. september 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini og loyva Havsbrún, at staðseta tveir lýsitangar á havnalagnum.

**39/21**
**21/00355-4 Fíggjarætlan 2022 - Fuglafjarðar kommuna - karmar til kunning og umrøðu á fíggjar- og býráðsfundi í juni 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.06.2021 | 28/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 45/21 |
| 3 Býráðið | 30.09.2021 | 39/21 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini. |
| Stutt lýsing | Viðløgdu skjøl – yvirlit yvir raksturin primo juni 2021 og fíggjarætlanin fyri 2022 - eru eitt fyribils útkast til fíggjarkarm fyri 2022.<br><br>Skattaprosentið er sett til 21,25 og barnafrádrátturin er settur til kr. 7.500.<br>Fuglafjarðar kommuna hevur enn ikki fingið nakra ábending um persónsskatt og P/F skatt í 2022.<br><br>Raksturin er settur til tað sama sum í 2021.<br><br>Við hesum útkastinum til fíggjarætlanarkarm fyri 2022, eru umleið 24 mió. kr. tøkar til íløgur og møguligan meirrakstur.<br><br>Til 31.05.2021 hevur skattainntøkan av persónskatti verið umleið 2 mio. kr. hægri enn mett.<br><br>Til kunning og umrøðu í fíggjarnevndini 24. juni og í býráðnum 1. juli 2021. Fíggjarætlanararbeiðið verður tikið upp aftur aftaná summarferiuna.<br><br>**Framhald 19. september 2021**<br>Fíggjarætlanararbeiðið verður nú tikið upp aftur. Viðlagt hesum máli er rakstrarroknskapurin higartil í ár pr. 16. september 2021 við møguleika til at seta av fyri 2022. Fíggjarnevndin varðar av økið 1, har tað í løtuni er ein markant yvirnýtsla.<br><br>Væntandi er ein meirinntøka í persónsskatinum í 2022 umleið 2 mió. kr. í mun til 2021. Skattaprosentið er ásett til 21,25. Fíggjarnevndin kan umrøða, um skattaprosentið skal lækka eitt sindur afturat sæð í |

5

| | |
|---|---|
| | ljósinum av, at býráðið hevur sett sær fyri at gera útstykkingarætlanir við atliti at tilflyting av borgarum.<br><br>Fíggjarnevndin eigur eisini at umrøða og gera eitt til- ella frámæli, um Fuglafjarðar kommuna skal knýta seg uppí skipanina Talgildu Føroyar, har tað er ein eingangsíløga á umleið 780 tús. kr. fyri at koma uppí skipanina og aftaná 2 ár, sum eru kostnaðarfrí, at gjalda umleið 75 tús. kr. árliga í rakstri.<br><br>Býráðið hevur 1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2022 á komandi fundi 30. september. 2. og endalig viðgerð av fíggjarætlanini verður á býráðsfundi 25. november 2021.<br><br>**Framhald 24. september 2021**<br>Grundað á § 39 í kommunustýrislógini, sum ásetir, at fíggjarnevndin fyri 1. oktober skal leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið, viðgjørdi nevndin karmarnar fyri fíggjarætlanina 2022 á fundi tann 22. september í ár við serligum atliti at økið 1, sum fíggjarnevndin beinleiðis varðar av.<br><br>Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at samtykkja fíggjarætlanina 2022 við 1. viðgerð tann 30. september 2021 við niðanfyri nevndu staðfestingum at umrøða og arbeiða víðari við á nevndarfundum og temadegi fram til 2. viðgerð av fíggjarætlanini 2022 seinni í heyst. Sambært nevndu áseting í kommunustýrislógini, skal fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt við 2. viðgerð í seinasta lagi tann 1. desember í ár:<br><br>Raksturin er settur til tað sama sum í 2021. Skattaprosentið er 21,25 og barnafrádrátturin er kr. 7.500,-<br>Fram til 31. august í ár hevur persónsskatturin verið umleið 1,7 mió. kr. hægri enn mett varð. Partafelagsskatturin er harafturímóti umleið 2. mió. kr. lægri enn metingin, umleið 12. mió. kr. Metingin var 14. mió. kr.<br><br>Fyribilsmetingar av eftirlønarskatti og flytingum vegna DIS og FAS eru tilsamans umleið 17,1 mió. kr., ein góð millión kr. hægri enn metingin.<br><br>Við hesum uppskotinum til fíggjarætlanarkarm fyri 2022 eru umleið 25. mió. kr. tøkar til at seta av til íløgur, meir niðurgjalding av skuld ella meirrakstur.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til, at rakstraútreiðslurnar í 2022 í heila tikið verða tálmaðar, eisini tí at nettoskuldin hjá kommununi nærkast einari álíkning. Í fíggjarætlanini fyri 2021 varð ásettur ein miðalvøkstur i rakstrinum á umleið 5% í mun til fíggjarætlanina fyri 2020. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarnevndin mælir til, at miðalvøksturin í rakstrinum fyri 2022 verður nakað lægri, í mesta lagi 3% í mun til fíggjarætlanina fyri 2021.<br><br>Víst verður til hjáløgdu skjøl við fíggjarætlanarkarmi fyri 2022 við fyribils tølum frá TAKS, yvirlitið yvir persónsskatt, eftirlønarskatt og flytingum vegna DIS og FAS. | | |
| Bakgrund | Fyrireiking av fíggjarætlanini hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Kommunala roknskaparkunngerðin**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Yvirlit yvir raksturin hjá Fuglafjarðar kommunu pr. 16. september 2021 við møguleika at seta av til fíggjarætlanina 2022** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Borgarstjórin, kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til, at fyriliggjandi fíggjarkarmur fyri 2022 skal liggja til grund fyri fíggjarætlanararbeiðið, sum verður viðgjørt nærri aftaná summarferiuna.<br><br>**Framhald 19. september 2021**<br>Kommunustjórin mælir til, at fíggjarnevndin ger tilmæli til býráðið í sambandi við 1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2022 tann 30. september 2021 við serligum atliti at tálma rakstrarútreiðslunum á økið 1 og koma við uppskotum um neyðugar íløgur í 2022. Samtíðis mælir kommunustjórin til, at evnisdagur um fíggjarætlanina 2022, sum býráð | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | og umsiting hava í felag, verður hildin eins í fjør í hølum hjá Dugna á Kambsdali hósdagin tann 21. oktober í ár.<br><br>**Framhald 24. september 2021**<br>Borgarstjórin og kommunustjórin mæla býráðnum til at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini og við 1. viðgerð samtykkja fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022. |
| Dagf | 19. juni 2021/19. september 2021 |

**Fíggjarnevndin 24. juni 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at fíggjarætlanararbeiðið verður beint í føstu nevndirnar í sambandi við fyrstkomandi fund aftaná summarferiuna. Rakstrarroknskapurin verður sendur formonnum/forkvinnum og skrivarum í nevndum, har tað er møguligt hjá nevndunum at seta tøl á tær raðfestingar, ið tær hava á hvør sínum øki. Heitt verður samtíðis á nevnd og skrivarar um at fara ígongd við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2022.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:**
Fíggjarnevndin gjøgnumgekk rakstrarstøðini á økið 1 og setti av á økjunum í neyðugan mun.



**Býráðið 30. september 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) fíggjarætlanina 2022 við 1. viðgerð og beindi málið víðari til 2. viðgerð

**40/21**

**21/00524-2 Broyting av byggisamtyktini fyri útstykkingina á Bøvegi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 16.09.2021 | 86/21 |
| 2 Býráðið | 30.09.2021 | 40/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Útstykkingin á Bøvegi loyvir sethúsabygging eftir galdandi byggisamtykt, men tó eru trý dupult grundstykkir, har loyvi er at byggja dupulthús.<br>Umsitingin hevur arbeitt við at broyta byggisamtyktina til meira fjøltáttaða bygging, har tað ber til at gera fýra búeindir á grundstykkinum, sum hvør í minsta lagi skal hava 150 fermetrar grundøki, og har tað ber til at sundurmatrikulera búeindirnar.<br>Fyrispurningar eru inni um at fáa loyvi til at gera fýra búeindir á einum dupultgrundstykki.<br>Verandi byggisamtykt loyvir eini búeind á einum grundøki á 300 fermetrar.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 30. september 2021**<br>Tekniska deild hevur gjørt eina plantekning, sum vísir økið, sum broytingin fevnir um. Víst verður til FK j. nr. 21/00524-4. | | |
| Bakgrund | Gera møguleika fyri at fáa meira fløltáttaða bygging á Bøvegi. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00524-4 Plantekning av økinum, sum broytingin fevnir um | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at loyva umsitingini at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri útstykkingarætlanina á Bøvegi, har tilber at byggja meira fjøltáttað, har tað ber til at gera fýra búeindir á einum grundøki, | | |

9

| | |
|---|---|
| | har minsta mark er 150 fermetrar fyri hvørja búeind, og at broytingaruppskotið verður lagt út til almenna hoyring og til ummælis.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin 30. september 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 16. septmeber vísandi til plantekning yvir økið, sum broytingin fevnir um. |
| Dagf | 13. september 2021. |

**Tekniska nevnd 16. september 2021:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum um at broyta verandi byggisamtykt fyri útstykkingina á Bøvegi galdandi fyri tann nýggjara partin frá Bøvegi nr. 57 og uppeftir í ovarru síðu, og frá Bøvegi nr. 40 og uppeftir í niðaru síðu, har møguleiki er fyri at hava eina búeind pr. 150 fermetrar grundøki.
Nevndin mælir til at leggja uppskotið til broyting av serstakari byggisamtykt fyri býráðið til næstkomandi býráðsfund.

**Býráðið 30. september 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd um broyting av byggisamtyktini fyri útstykkingina á Bøvegi.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**41/21**
**21/00536-4 Kristian Martin Petersen innkallaður sum tiltakslimir í sambandi við býráðsfund tann 30. september 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.09.2021 | 41/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Magni Jøkladal, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 30. september 2021 kl. 19:00. Eftir ynski frá Magna Jøkladal er Kristian Martin Petersen kallaður inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldi limurin á lista B við 46 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 30. september gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Bakgrund | Magni Jøkladal, býráðslimur hevur forfall til býráðsfundin 30. september 2021 kl. 19:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl **Teldubrævasamskifti við ávíkavist Magna Jøkladal og Kristian Martin Petersen, dagfest 20. september 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 30. september 2021 kl. 19:00. | | |

11

| Dagf | 20. september 2021 |
|---|---|

**Býráðið 30. september 2021:**
Býráðið góðkendi einmælt (8-0), at Kristian Martin Petersen tekur sætið á býráðsfundinum í kvøld.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

# 42/21
# 21/00549-2 Privatlívspolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu - dátuverndarkunning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.09.2021 | 42/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Dátueftirlitið vendi sær tann 14. september í ár skrivliga til Fuglafjarðar kommunu og heitti á kommununa, um at lata eftirlitinum frágreiðing um hvussu Fuglafjarðar Kvøld- og ungdómsskúli lýkur kunningarskylduna sambært § 23 í dátuverndarlógini – løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum. Samsvarandi § 23 í nevndu lóg skal kommunan sum dátuábyrgdari kunnað skrásetta borgaran, tá kommunan skrásetir persónupplýsingar hjá viðkomandi.<br><br>Í sama brævi heitir Dátueftirlitið á kvøldskúlan um at lata eftirlitinum skrivligar mannagongdir fyri, nær og hvussu kvøldskúlin strikar upplýsingar um persónar, sum eru skrásettir í skipanini hjá kommununi. Freistin fyri at lata hesar upplýsingar, ásetti Dátueftirlitið til at verða tann 27. september 2021.<br><br>Áheitanin hjá Dátueftirlitinum til Fuglafjarðar kommunu tekur støði í at nevnda dátuverndarlóg frá 1. januar í ár hevur ásetingar um, at almennir myndugleikar og privatar fyritøkur skulu arbeiða miðvíst við at verja persónupplýsingar, sum verða viðgjørdir hjá eitt nú kommununi. Ásetingarnar í dátuverndarlógini taka støði í ES fyriskipanum og hugtakinum GDPR – General Dato Protection Regulation – har myndugleikar skulu hava ein persón starvssettan, sum eisini tekur sær av hesum økinum, nevndur DPO – Data Protection Officer. Hjá Fuglafjarðar kommunu er henda uppgáva fyribils útveitt til uttanhýsis ráðgeva Jens Christian Olsen, Sp/f Eirin, sum er DPO hjá kommununi og sum hevur gjørt uppskot til fyriliggjandi privatlívspolitikk til Fuglafjarðar býráð á góðkenna.<br><br>Tá nevnda áheitan kom frá Dátueftirlitinum hevur Jens Christian Olsen arbeitt saman við kvøldskúlaleiðaranum og kommunustjóranum um at fáa tilevna privatlívspolitikkin, sum saman við øðrum viðkomandi skjølum, varð sendur Dátueftirlitinum mánadagin tann 27. september í ár. |
| Bakgrund | Áheitan frá Dátueftirlitinum við støði í § 23 í dátuverndarlógini. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Dátuverndarlógin – løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til prívatlívspolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu, dagfest 27. september 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til, at býráðið góðkennir fyriliggjandi uppskot til privatlívspolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu. | | |
| Dagf | 26. september 2021 | | |

**<u>Býráðið 30. september 2021:</u>**

Býráðið samtykti einmælt (9-0), at útseta viðgerðina av fyriliggjandi uppskoti til 14
privatlívspolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu til ein seinni fund, og ynskir býráðið eina nærri
kunning frá ráðgevanum um nýggju persónupplýsingarlógina og viðurskifti kring dátuvernd.

Fundurin lokin kl. 20:10.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Ólavur Larsen

Gudny Vang

Kristian Martin Petersen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo